# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Kanningarstjóra – sjálvandi!

Uppskot Sjálvstýrsifloksins um kanningarstjóra at kanna lásagøluna í Tinganesi er gott. Sjálvstýrisflokkurin mælir í fyrstu atløgu til, at landsstýrismálanevndin setur kanningarstjóra eftir § 38, stk. 2 í stýrisskipanarlógini. Men Sjálvstýrsiflokkurin fer longur enn so og vendir kanónunum móti løgmanni við tað, at flokkurin krevur, at eisini verður kannað, hvørt løgmaður hevur forsømt sínar skyldur at samskipa landsstýrið og áhaldandi at kunna Føroya Løgting um støðu landsins, samráðingar við onnur lond, og ikki minst skylduna at tilbúgva landsins fíggjarlóg. Spurningurin er um hendan snaring gagnar málinum. Tað er í áhuganum hjá øllum, at lásagølan verður uppklárað og staðfest verður einaferð med alla, hvør, ið sigur satt og hvør, ið sigur ósatt og at staðfest verður, hvat veruliga er farið fram í hesum máli.

Spurningurin, hvørt løgmaður hevur forsømt sínar politisku skyldur, er ein reint politiskur spurningur, sum hvørki hevur við landsstýrirsmálanevnd ella kanningarstjóra at gera. Her er talan um ein spurning, sum bert løgtingið eigur at taka støðu til. Metir ein flokkur, í hesum føri Sjálvstýrisflokkurin, at her er talan um vánaliga politiska leiðslu, eigur Sjálvstýrsiflokkurin at reisa málið á tingi sum eitt tingmál og her eru fleiri møguleikar. At leggja spurningin, hvørt ein løgmaður ger sínar politisku skyldur fyri kanningarstjóra, er at gera júst tað, sum annar av tingmonnum Sjálvstýrisfloksins plagar at ávara ímóti, nevniliga at gera politikk til jura, so her eiga tingmenn at hugsa seg væl um.

Hinvegin halda vit tað sum nevnt tað vera rætt at lata kanningarstjóra útgreina, hvat, ið er farið fram í lásagøluni. Hesum taka bæði løgmaður og fyrrverandi varaløgmaður undir við, so tað er upplagt at fylgja ráðum Sjálvstýrisfloksins her. Kanningarstjóri eigur tí sjálvandi at verða settur at kanna lásamálið so væl sum flytingina av ávísum tænastumanni. Lásamálið og tað, sum heruppií hongur, er nú vorðið so brunnið, at almenningurin hevur krav uppá, at hetta mál verður lýst út í æsur. Øll gongdin eigur at verða kortløgd og politiska og embætisliga ábyrgdin eigur at verða staðfest. Verður hetta mál ikki útgreinað og fær almenningurin ikki allan sannleikan um hetta mál, ja so fer hetta at liggja sum eitt opið sár, sum fer at eitra føroyskan politikk í nógv ár framyvir. Síðan hetta mál kom í ljós, hevur løgmaður roynt at niðurtóna týdningin av hesum máli fyri sjálvt slitið við Tjóðveldi, meðan fyrrverandi varaløgmaður hevur hert tónalagið í hesum máli. Hetta kann ikki halda fram, tí hetta er til skaða fyri umdømið hjá politisku skipanini. Harvið er hetta mál til ógagns fyri demokratiið og eigur tí hvør steinur at verða vendur, so føroyskur politikkur kann koma víðari.

**Sosialurin**

## Stóri feilurin í sjúkrahúsverkinum er í løgtinginum

**BJARNI HANSEN**
Runavík



Nógv verður tosað og skrivað um sjúkrahúsverkið, men eg ætli mær at siga nakað um mínar royndir, sum eg havi.

Kona mín lá tríggjar ferðir á Landssjúkrahúsinum í Havn ígjøgnum átta ár. Hon læt ógvuliga væl at, og eg sá eisini, hvussu gott hon eftir umstøðunum hevði tað, tá hon hon plagdi at vera ein mánað á sjúkrahúsinum. So søgdu tey, at nú kundu tey ikki gera meira, og so slapp hon á hvíldarheimið og var har í ein mánað. So slapp hon heim.

Vit plagdu at ferðast uttanlands í feriuni í einar 14 dagar og eitt sindur meira viðhvørt, og so arbeiddi hon aftur sum vanligt. Men á sumri í 2003 kundi hon ikki meira. Tá var hon ikki so leingi á sjúkrahúsinum, sum vanligt. Tá segði læknin, at nú kundu tey ikki gera meira, og at hon mátti sendast heim.

Tá fingu vit heimahjálp og tvær komu fimm ferðir um dagin, umframt at heilsusystrar eisini komu. Tær passaðu hana heilt einastandandi væl, so vit kunnu bara lata heilt væl at, og tað kundi ikki verið betri.

Á sjúkrahúsinum fekk hon ilt úr einum tóli, tá tað var neyðugt, men tað kundi hon ikki fáa heima, tó at eg bað um at fáa tað heim við, tí tey søgdu, at tað hevði eg ikki kunnleika til at brúka. Men ilt hevur verið nakað, sum eg havi arbeitt við ígjøgnum alt mítt vaksna lív, og eisini havi eg verið lærdur um teir vandar, tað kann hava við sær.

Eitt kvøldið, eg sat við songina hjá henni, hevði hon tað so ringt, at eg ringdi til lækna. Men tann automatiski svararin kom til og gav mær eitt annað nummar at ringja til. Men tað fungeraði ikki, sum tað skuldi, so eg mátti ringja 112. Tá svaraði beinanvegin, og tað gekk bara ein lítil løta, so stóð sjúkrabilurin í túninum. Teir høvdu ilt við sær, og so var støðan undir kontroll. Tá teir so høvdu fingið fatur á lækna, koyrdu teir hana til Havnar.

Tá hon so kom á B6, fekk eg inntrykk av, at hon slapp at verða har, til tað var liðugt. Men eitt kann man síggja, sum hevur verið har, at tey hava nóg mikið at gera, og tað verður runnið bæði dag og nátt. Man sær, at har er lítið fólk til at gera tað, sum gerast skal, men tey gera tað, tey kunnu. Sum eg síggi tað, eru tað pengar, sum vanta, og tí er tað í løgtinginum, at tann stóri feilurin er við sjúkrahúsverkinum.

Um ein er sjúkur í einari familju, roynir man alt, man kann gera, fyri at hjálpa. Eg gráti mangan, tá eg hugsi um, hvussu nógv tey gera, sum arbeiða á sjúkrahúsinum og tað sama í heimahjálpini. Tað er eitt arbeiði, sum ikki kann metast nóg høgt.

Summarið 2004 fekk eg ein blóðpropp í hjartað. Hetta var klokkan átta um morgunin, og eg var einsamallur inni, men fekk tó ringt til læknan. Hann var á veg til arbeiðis og hevði havt vakt um náttina. Hann var hjá mær heilt skjótt, og tá hann kom inn, gav hann mær eina morfinsproytu.

So skjótt hann hevði gjørt tað, var sjúkrabilurin longu har, so læknin má hava ringt eftir honum, meðan hann koyrdi til mín. Teir koyrdu meg so suður á Landssjúkrahúsið, har eg var, til tey sendu meg niður á Ríkissjúkrahúsið. Har løgdu teir æðrarnar uttan um hjartað, og síðani havi eg verið sum nýggjur.

Hans Pauli Strøm, takk fyri ta støðu, tú tókst, tá tú segði, at tað skuldi ikki sparast nakað burtur í sjúkrahúsverkinum!

Eitt hjartasuff havi eg tó aftrat, og tað er um pensjónina, sum bæði konan og eg vóru væl nøgd við. Men sum tað var fyrr, at man skuldi gjalda ta seinastu mánaðarlønina aftur, tá man var deyður, helt eg vera nokk so nógv avgjørt. So tá kona mín doyði, hugsaði eg, at hatta geri eg ikki. Fyrr skuldi eg inn at sita, um tað skuldi verða.

Tí slapp eg kortini frá, tí tá fekk eg tríggjar mánaðarpensjónir, aftaná at hon var deyð. Tað kom væl við, tí tað er nógv ymiskt, sum skal gjaldast. Hesum syrgdi Helena Dam á Neystabø fyri, tá ein einkja ringdi til hennara. Tá segði Helena, at hatta visti hon ikki.

Men nú er tað so, at tá eg doyggi, skal tann seinasta lønin gjaldast aftur. Nú veit eg ikki, nær tað verður, men eg plagi at biðja bankan gjalda tað fasta, so har er ikki nógv eftir. Eg komi so í øllum førum at skylda, tá eg eri farin, so tað verður bara skuld at arva, tí eg eigi einki uttan fólkapensjónina.

So nógv halda okkara politikarar okkum vera verd, tá atkvøðan er deyð. Vóru politikararnir líka trúgvir ímóti veljarunum, sum ímóti sær sjálvum, høvdu teir unt okkum hasar tríggjar lønirnar eisini, tá vit eru deyð.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsíður |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.